Steffan Klein Poulsen **Nr. 11/2020**
Bill Justinussen
løgtingsmenn

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um barnavernd, settur landsstýrismanninum við almannamálum Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS §52 a)

1. Fær Almannamálaráðið áheitanir og fráboðanir vegna ónøgd við málsviðgerð, mannagongdir og avgerðir í barnaverndarmálum?
2. Um ja, hvat eru vanligu orsakirnar til hesar áheitanir og fráboðanir, hvussu nógvar hava tær verið í tali seinastu 5 árini, og hvussu verða tær viðgjørdar í ráðnum?
3. Metir landsstýrismaðurin, at verandi kæruskipan á økinum er nøktandi?
4. Hvussu fremur landsstýrismaðurin sítt eftirlit við ávikavist kommununum og Barnaverndarstovuni, sambært § 67 í barnaverndarlógini?
5. Hvat heldur landsstýrismaðurin um status á barnaverndarøkinum eftir 15 ár við barnaverndarlógini?
6. Er tørvur á eini eftirmeting av verandi skipan og lóggávu á barnaverndarøkinum?

Viðmerkingar:
Tað frættist javnan, eisini alment á m.a. sosialum miðlum, um ónøgd og frustratiónir við málsviðgerð og avgerðir í barnaverndarmálum. Fyrispurningurin er settur fyri at fáa greiðu á, um talan er um ein trupulleika við verandi skipan og/ella lóggávu og um tørvur er á eini eftirmeting.

Ein eftirmeting bleiv gjørd í 2011 og eftirfylgjandi fleiri broytingar í 2012. Hóast hesar broytingar tykist tað at vera stór ónøgd í barnaverndarmálum.

Á Løgtingi, 2. september 2020

Steffan Klein Poulsen og Bill Justinussen